

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 01 - 2013

# Leita eftir olju uppi á landi í Danmark

Danir gera nú enn eina roynd at leita eftir olju uppi á landi. Hesaferð eru 50 bretar leigaðir til at kanna undirgrundina undir Lollandi. Tað er danska felagið DK Consult, sum stendur fyri kanningunum saman við danska statinum, Norðsjóvargrunninum og tveimum amerikonskum feløgum. Tann fyrsta boringin verður við Våbensted, og er so mikið av olju har, at tað er lønandi at taka hana upp, kann tað fáa sera stóran týdning fyri Lolland, sigur Hans Koch hjá DK Consult við kringvarpið DR. -Okkum nýtist bara at hyggja at Esbjerg, og hvussu tað broytti eitt illa trongt fiskivinnusamfelag til ein bý í vøkstri og menning, at olja og gass vórðu funnin í Norðsjónum, sigur hann. Verkætlanin á Lollandi fer at kosta eina knappa milliard krónur, áðrenn nøkur verulig framleiðsla kann setast í gongd, men hinvegin kann ætlanin geva nógvar milliardir, um nóg mikið er at finna í undirgrundini. Danir hava fyrr borað eftir olju og gassi uppi á landi. Tað var í Jyllandi, og tær royndirnar vístu, at har var bæði olja og gass, men tó ikki í so stórum nøgdum, at tað loysti seg at fara undir framleiðslu.